# BÓKASÍÐAN

*bøkur, bøkur, bøkur…*



*Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

## Norðuratlantiskir tvídráttir

Palle Kjærullf-Schmidt, *Lys og skygge – Fra Grønlands og Færøernes verden,* Tinok, 2006

Herfyri gav forlagið Tinok út myndabókina *Lys og skygge* eftir Palle Kjærullf-Schmidt, við myndum úr Grønlandi, Føroyum og lutvíst Íslandi. Saman við myndunum hugleiðir myndamaðurin um lívið í Norðuratlanshavi, meðan hann sum ferðandi gevur sær góðar stundir og pláss fyri tí fremmanda.

Bókin er skipað sum ein innara samrøða við søguna, fólkið og mentanina, har høðru kontrastirnar í myndunum tykjast endurspegla tvídráttin, høvundurin sær sum eyðkenni fyri grønlendska og føroyska samfelagið.

Í myndum og tekstum møta grønlendingar danska høvundanum og myndamanninum við einum yvirskoti av egnari inuitmentan, sum tey royna at sameina við modernaða samfelagið. Kanska vita grønlendinar ikki reiðiliga, hvagar leiðin ber, men mentanararvurin er so sterkur, at tey onga løtu ivast í, hvar tey eru.

Øðrvísi er tað við føroyingum. Her møtir høvundurin einum tungum syndafikseraðum kristindómi, innara tvídrátti og støðugari ósemju um sambandið við Danmark. Kanska hava føroyingar ein so krampakendan hugburð mótvegis øllum, sum er danskt, júst tí føroyski samleikin ikki á ein nóg týðiligan hátt skilur seg frá tí danska? Man tað vera tí, føroyingar hava so nógv størri tørv á at vera tjóðskaparsinnaðir enn grønlendingar, spyr høvundurin, uttan tó at koma við nøkrum svari. Í staðin letur hann myndirnar tosa og lesaran hugleiða víðari.




*Myndabókin »Lys og skygge« er ein innara samrøða við grønlendsku og føroysku søguna, mentanina og fólkið*

# Aldurdómurin inn á bókapallin

Ungdómurin er ikki longur einaráðandi, tá tað ræður um at manna leiklutirnar í bókmentum. Eldru og gomlu røddirnar gerast alsamt fleiri, og bókafólk fegnast, tí rákið er við til at fjøltátta einføldu myndina av aldurdóminum

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tey eru allastaðni. Bæði sum høvundar og sum høvuðspersónar í bókunum hjá høvundunum. Tey eldru og gomlu lata sær ikki longur lynda við einum plássi í skugganum av eimum ungu, men verða viðgjørd av bæði eldri og yngru høvundum. Og sambært ummælarum, granskarum og høvundum er myndin, vit fáa av teimum gomlu í hesum døgum, nógv meir fjølbroytt enn kanska nakrantíð, skrivar Kristeligt Dagblad.



*89 ára gamla Jytte Borberg er ein av høvundunum, sum er við til at venda myndini í bókmentum av aldurdóminum*

### Tørvur á symbolskari fatan

– Rákið er positivt og átrokandi neyðugt í einum samfelag, sum annars tykist hava samtykt, at aldurdómur merkir sjúka, sigur Jørgen Povlsen á Syddansk Universitet, sum granskar í sambandinum millum aldurdóm og bókmentir. Sum dømi um eldrabylgjuna í bókmentum nevnir hann *Ingenmandsland*, eftir Kirsten Thorup, *Tæppefald* eftir Ole Juul og *Evig Ungdom* eftir Maria Markussen.

Jørgen Povlsen vísir á, at um ikki listin eisini viðgerð aldurdómin, verða tað tíðarinnar skiftandi sannleikar, sum sleppa at gera av, hvørja mynd vit hava av teimum gomlu

– Okkum tørvar eina meir kensluliga, sansaliga og andliga fatan av, hvat tað vil siga at vera gamal. Og júst hetta er sjálvskrivaða økið hjá listini og teimum humanistisku fakunum. Við aldrinum kemur kenslan av tí, sum ikki slepst undan, og tí verður tørvurin á at skilja lívið á einum symbolskum støði størri, sigur Jørgen Povlsen

### Illsinni prutlar

Sambært høvundanum og ummælaranum Lars Bukdahl hongur rákið saman við, at meðan høvundar fyrr løgdu skrivingina aftur um seg, tá teir vóru umleið 40, halda teir í dag áfram at skriva, hóast teir langt síðani eru farnir um pensjónsaldur.

– Klaus Rifbjerg, Jytte Borberg og allir hindir eldru høvundarnir eru ikki bara tigandi, vísir ella í barndómi. Tey megna at halda illsinninum á lívi og skrivingini í kók, og tað er frálíkt. Tey skriva stórar, ørar skaldsøgur og rúkandi óðar yrkingar, sum skelda allan heimin út. Tað ger myndina av tí eldru røddini meir litfagra og skapar eina livandi útgávu av, hvat lívsroyndir eru fyri nakað, so tað alt ikki bara verður klók vísdómsorð, sigur Bukdahl.

Fyri júst Jytte Borberg, sum er fødd í 1917, er eitt lív við listini ein lívslang lærutíð. Hjá henni eru lívsroyndirnar eitt av mest týðandi arbeiðsamboðunum.

– Tá eg skrivi, brúki eg bæði nýggjar og gamlar royndir. Eg hugsi, at hetta er tann, eg eri í dag. Eg hugsi ikki um, at eg eri gomul og síggi ikki mín aldur hvørki sum drívmegi ella íblástur. Tvørturímóti er skrivitilgongdin líka nýggj og undranarverd hvørja ferð, sigur Jytte Borberg.

## Intelligent machoskaldsøga

Levi Henriksen, *Snø vil falle over snø som har falt,* Gyldendal, 2005

Dan Kaspersen er júst leyslatin úr fongsli og kemur nú aftur til heimbygdina Skogli, sum ein merktur maður. Tað er vetur, bítandi kalt og lítli bóndagarðurin, har hann vaks upp, kennist oyðin og einsligur. Beiggi Dan hevur júst tikið lívið av sær, og familjan væntar, at Dan nú tekur sær av garðinum. Ikki júst ein ynskibyrjan, hjá eini friðleysari sál sum Dan, sum nú, hann nærkast teimum 40, heldur tíðina verða koma at fáa skil á sínum lívi.

Sjálvur hevur høvundurin Levi Henriksen samanborið skaldsøguna við ein country sang, og samanberingin hóskar kanska betri, enn hann ætlaði. Søgan er kensluborin á markinum til at vera banal í mátanum, hon hugleiðir um, hvussu torført tað er at vera menniskja. Kortini verður røddin í henni hangandi í oyrunum eins og ein country sangur, langt aftaná at hann er liðugur. Skeivu og forfjóðnaðu lagnurnar í Skogli eru hugtakandi á sín egna hátt, meðan lýsingin av kúgandi pinsaumhvørvinum, Dan er vaksin upp í, í løtum verður næstan lokkandi.

Onkur ummælari hevur kallað bókina eitt modernað verk um brotsverk og revsing, meðan onnur halda hana imponera mest við at vera nakað so óvanligt sum eina "intelligenta machoskaldsøgu"




*Um ein country sangur var ein bók, hevði hann kanska ljóðað sum norska skaldsøgan Snø vil falle over snø som har falt eftir Levi Henriksen*

## Meir kanonrumbul

Best sum friður aftur tóktisk valda kring donsku kanonverkætlanina, hevur danski mentamálaráðharrin, Brian Mikkelsen, aftur fest eld í. Hesuferð tí hann í farnu viku endurtók sínar útsøgnir, har hann ger kanonina til part av síni egnu mentanarpolitisku herferð og sigur útsøgnirnar hava enn meir gildi nú enn nakrantíð. Hetta hevur fingið Erik A. Nielsen, lim í nevndini fyri bókmentakanonina, at boða frá, at hann ikki longur vil hava sítt navn knýtt at kanonverkætlanina, og vil hann hava tey bókmentaverk, hann hevur verið við til at velja, strika av bókmentakanonini.



*Erik A. Nielsen, limur í nevndini fyri kanon yvir bókmentir, vil nú hava verkini, hann hevur verið við til at velja, strika av kanonlistanum*

**Stórar, tjúkkar, tunnar, smáar, langar…**
Á Føroyaprent eru allar bøkur vælkomnar
Vit hava drúgvastu royndirnar innan bókaprent
FØROYAPRENT
Hoyvíksvegur 59 | 110 Tórshavn | Tel. 314 555 | www.foroyaprent.fo